

## Bjargaði russum

Ein tyrla hjá norsku bjargingartænastuni bjargaði í gjár tólv monnum av einum russiskum farmaskipi, sum var farið á land nærhendis Murmansk. Bjargingartænastan fekk gjáramorgunin boð um, at farmaskipið var um at fara á land, og tá tyrlan kom á staðið, stóð skipið inni í fjøruni. Tað var tjúkt í veðrinum, og tí tordu onnur skip ikki inn at hjálpa. Tað er ógreitt, hví skipið fór á land, men NTB skrivar, at skipið hevði ongan streym.

# Linur dómur skakar

**Dómurin í málinum, har tríggir smádreingir vóru kynsliga misnýttir av sama manni, er skakandi og vísir, at samfelagið góðtekur, at børn verða misnýtt. Hetta heldur Arnbjørn Fagraklett, sum sjálvur varð misnýttur sum barn**

MISNÝTSLA

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*- Dómurin í gjár vísir, at vit sum samfelag góðtaka, at børn verða misnýtt. Hevði hann verið bankaránari, hevði dómurin verið nógv harðari. Men hesin maðurin hevur oyðilagt fleiri lív og fær bara ein mildan dóm, sigur Arnbjørn Fagraklett, sum sjálvur varð misnýttur sum barn*

Ein 50 ára gamal maður varð í gjár dómdur fyri »blufærdighedskrænkelse« í einum máli, har hann var ákærdur fyri at hava misnýtt tríggjar beiggjar, sum allir vóru undir 12 ár, tá misnýtslan fór fram.

Misnýtslan fór fram frá 1998 til 2006, men av tí at lutfalsliga milda lógargreinin um »blufærdighedskrænkelse« varð brúkt, vóru allar hendingarnar frammanundan 28. August 2002 fyrnaðar.

Maðurin varð dómdur átta mánaðar fongsul, og elsti beiggin fekk 5.000 krónur í endurgjaldi, meðan teir tveir yngru fingu 15.000 krónur hvør.

Arnbjørn Fagraklett, sum í seinastu viku segði sína søgu, um hvussu hann varð misnýttur í fleiri ár, uttan at nakar uppdagaði tað ella segði nakað, er skakaður av dóminum í gjár.

- Hetta vísir, at vit sum samfelag góðtaka, at børn verða misnýtt. Hevði hann verið bankaránari, hevði dómurin verið nógvar ferðir harðari. Men hesin maðurin hevur oyðilagt fleiri lív og fær bara ein mildan dóm, staðfestir Arnbjørn.

Hann heldur, at bæði politikarar og samfelagið sum heild eiga at nýta høvi, nú størri opinleiki er um kynsliga misnýtslu, at endurskoða revsingina, sum misnýtarar fáa.

Arnbjørn sigur, at hann bara hevur fingið jaligar afturmeldingar fyri at hava sagt sína søgu, men hann vil fegin leggja dent á, at hetta ikki snýr seg um at taka synd í honum. - Eg eri komin víðari og havi við góðari hjálp fingið eitt gott lív. Men tað er børn, sum liva í líknandi ræðuleikum í dag.

- Tað nyttar ikki, at vit bara snakka rundan um evnið. Misnýtslan skal stegðast og fáa avleiðingar. Men ein slíkur dómur sum tann í gjár gevur ikki misnýttum fólki mót at standa fram og ákæra, heldur Arnbjørn Fagraklett.

- Hesin dómur sigur eisini við misnýtarnar, at teir ikki hava so nógv at óttast. Lógarbrotini fáa ongar álvarsligar avleiðingar álíkavæl, sigur hann avgjørdur.

# Heita vatnið mennir børn

**Venjingarhylurin á Skúlanum á Trøðni hevur verið stongdur í trý ár, tí umvælingin hjá Landsverk dregur út. Hetta hevur sera óhepnar avleiðingar fyri menningina hjá børnunum, sigur fysioterapeuturin á skúlanum, Birgit Durhuus**

SERSKÚLI

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Tað er ein stórur missur, at veningjingarhylurin á Skúlanum á Trøðni ikki er tøkur. Hetta sigur Birgit Durhuus, sum hevur arbeitt sum fysioterapeutur á skúlanum í fleiri ár.

- Vit vóru sera fegin, tá umvælingin byrjaði, tí fyltrið hevði verið vánaligt leingi, og vit fingu ikki brúkt hylin so nógv, sum vit ynsktu. Heita vatnið ger stóran mun fyri kropsligu menningina hjá børnunum og harvið eisini fyri alla innlæringina, sigur Birgit Durhuus.

Hon greiðir frá, at fyri tey multihandikappaðu børnini er ein heitur hylur einasti møguleiki at røra seg.

- Tað er so rørandi at síggja hesi børnini, sum einki kunnu, knappliga uppdaga at tey kunnu flyta seg niðri í vatninum.

Birgit Durhuus hevur arbeitt á Skúlanum í Trøðni í fleiri ár og er sera góð við skúlan. Tí kennist tað sárt at hann ongan góðan eigur hjá myndugleikunum.

- Vit eru rættiliga ósjónlig í samfelagnum, tí vit altíð royna at vera so varin. Tað er sárt fyri foreldur at hava



eitt brekað barn, og vit taka okkara tagnarskyldu í størsta álvara, sigur fysioterapeuturin.



*- Øll tey almennu átøkini fyri at menna og styrkja íverksetaramentanina í Danmark hava loyst seg, sigur Elin Ellefsen, eigari og stjóri av danskari fyritøku*

# Læra av donskum íverksetara royndum

**Føroyingar kunnu læra av politisku átøkunum í Danmark, har landið stuðlar íverksetanarhúsum uttan at oyðileggja vinnuliga dynamikkin. Hetta kom fram á fundi um íverksetan í Miðlahúsinum í gjárkvøldi**

ÍVERKSETAN

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

- Tiltakið vísti, at stórur áhugi er fyri íverksetan í Føroyum, men eisini at vit eru nøkur ár aftanfyri Danmark, sigur Elin Ellefsen, sum í 1992 setti fyritøkuna, Life Skills, á stovn í Danmark. Life Skills hevur í dag fimm fólk í starvi, og er veitari av heimasíðum umframt skeiðum innan KT og HR-menning.

Á fundinum í Miðlahúsinum greiddi hon frá um støðuna í Danmark, har íverksetarar hava møguleika at leiga seg ókeypis inn í sokallað íverksetarahús í eitt hálvt ár og fáa atgongd til hjálp og stuðul innan marknaðarføring, bókhald og so víðari.

- Øll tey almennu átøkini fyri at menna og styrkja íverksetaramentanina í Danmark hava loyst seg, sigur Elin Ellefsen. Ein nýggj kanning staðfesti til dømis, at ein meiriluti av IT stjórunum í Danmark kundu hugsa sær at sett okkurt nýtt í gongd.

- Fyri seks árum síðani høvdu teir ikki svarað so, tí tá stóð tú púra einsamallur, um tú fórt í gongd við okkurt. Og gekk tað ikki fyrstu ferð, so stóð tú í stórari skuld og orkaði ikki í gongd aftur.

- Í dag er tað so, at um bankin sigur, at hann trýr upp á títt hugskot, so kautionerar staturin fyri 80 prosent av láninum við teim sokallaðu Kom-igang lánunum.

Íverksetarahúsini eru eisini knýtt til mentorar og business angels, sum eru ríkir handilsmenn, sum ynskja at seta pening ella tíð av til nýggjar fyritøkur. Og eisini etableraðar fyritøkur, sum ynskja at vaksa, hava møguleika at fáa hjálp frá millum øðrum Vækstfonden.

### Má ikki drukna í fyrisiting

Í Føroyum er Íverksetarahúsið í Klaksvík einasta konkreta tiltakið innan íverksetan. Húsið verður stýrt av einum grunni, og Eik og Klaksvíkar Kommuna hava sett pengar í. Landið hevur ikki sett pengar í Íverksetarahúsið. Í Danmark eru íverksetarahús eisini stýrd sum grunnar, meðan landið fíggjar. Hetta ger, at pengar eru til góð tilboð til íverksetarar, men umsitingin er ikki bundin at landinum, men heldur tí meira dynamiska vinnulívinum.

Bjarni Djurholm segði á fundinum, at samgongan hevur ein yvirskipaðan politik um íverksetan og arbeitt hevur verið fyri at fáa konkretiserað hetta.

Elin Ellefsen heldur, at føroyingar mugu ansa eftir ikki at lata góðar ætlanir drukna í umsiting.

- Tað er eingin grund til at uppfinna djúpa tallerkin umaftur. Vit kunnu læra av donsku royndunum, har landið kemur við pengunum, og letur eldsálir fáa tingini at koyra, staðfestir føroyski íverksetarin og stjórin í Danmark.